# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vitjan pávans hevur stóran týdning og kann vónandi byggja brýr millum mentanir*
*turkiski forsætisráðharrin*

# Pávin á semingsferð



*Benadikt 16. pávi og turkiski forsetin, Ahmet Necdet Sezer.*

**Ørindini hjá Benadikt 16. páva í Turkalandi eru at byggja brýr millum kristindómin og islam og millum ortodoksar og katolikkar. Men uppgávan er trupul.**

Benadikt 16. pávi fekk eina góða móttøku, tá hann kom til Ankara í gjár. Tayyip Erdogan, forsætisráðharri og formaður í einum islamskum flokki, gav sær stundir til at taka ímóti gestinum, áðrenn hann mátti á toppfund hjá NATO í Riga. Báðir løgdu dent á, at tað er neyðugt við samskifti og semju, sjálvt um nógvir turkar eru í øðini um, at pávin váðar sær at koma til Turkalands, eftir at hann eftir teirra tykki tosaði niðrandi um Muhammed profet fyrr í ár.

- Tygara vitjan hevur sera stóran týdning, segði Tayyip Erdogan. Í einari røðu í tjóðartinginum segði forsætisráðharrin seg vóna, at vitjanin hjá pávanum kann virka fyri friði millum mentanir. Tá pávin seinni vitjaði gravstaðið hjá turkiska landsfaðirinum Kemal Atatürk, skrivaði hann í gestabókina:

- Í Turkalandi møtast ymsar mentanir og ymsir átrúnaðir, og landið er ein brúgv millum Asia og Evropa.

### Spenningur

Hóast tey vøkru orðini var tað týðiligt, at tað eru ikki allir turkar, sum eru líka fegnir um vitjan pávans. Teir seinastu dagarnar hava mótmælisfólk í túsundatali verið í gøtunum, har tey hava mótmælt vitjanini og rópt ókvæmisorð eftir pávanum. Fólk eru í øðini um, at pávin eftir teirra tykki tosaði niðrandi um Muhammed profet og islam í einari røðu í Týsklandi í september. Pávin hevur seinni sagt, at ætlan hansara var ikki at niðra profetin ella læru hansara, men tá var ov seint.

Turkisku myndugleikarnir hava fyrireikað seg væl til vitjanina, og trygdartiltøkini eru sera strong. Trygdarmenn standa á hvørjum horni, vápnaðir løgreglumenn eru á varðhaldi allastaðni, og bumbuserfrøðingar hava kannað hvønn krók, sum pávin skal vitja. Myndugleikarnir hava ikki gloymt, at tað var ein landsmaður teirra, Ali Agca, sum royndi at beina fyri Jóhannesi Páll páva í Rom í 1981.

### Kristin spjaðing

Eru viðurskiftini millum kristindómin og islam trupul, er støðan ikki minni trupult millum katolikkarnar og tey ortodoksu. Tey bæði kirkjusamfeløgini fóru hvør til sítt fyri 950 árum síðani, og guðfrøðiligar og aðrar ósemjur hava gjørt, at tey hava havt at kalla einki samband við hvørt annað síðani.

Benadikt pávi hevur gjørt av at vitja leiðaran í teirri ortodoksu kirkjuni, patriarkin Bartholomeus fyrsta, sum hevur høvuðssæti í Istanbul, og ørindini eru at royna at byggja brýr ímillum tey bæði kirkjusamfeløgini. Men eygleiðarar siga, at tað verður ein trupul uppgáva, hóast ávís framstig hava verið tey seinastu 40 árini.

Í Istanbul skal pávin eisini vitja ta bláu moskuna, og hetta er aðru ferð í søguni, at ein pávi vitjar eitt islamskt guðshús. Hann skal eisini vitja Sofia-dómkirkjuna, sum í meiri enn túsund ár var tann størsta kirkjan í tí kristna heiminum, áðrenn hon bleiv moska. Í dag er hon savn.

# Opiumsmet í Afghanistan

Alt fleiri bøndur í Afghanistan velja at dyrka opium, og í ár setir útflutningurin nýtt met.

Hóast USA og hini londini, sum hava hermenn í Afghanistan, hava roynt at fáa bøndurnar at dyrka okkurt annað enn opium, er gongdin tann beint øvugta. Í einari nýggjari frágreiðing skriva ST og Heimsbankin, at alt fleiri bøndur dyrka opium, og at teir fara at heysta umleið 50 prosent meiri í ár enn í fjør.

Í frágreiðingini stendur, at allar royndir at tálma opiumsdyrkingini eru miseydnaðar orsakað av umfatandi korrupsjón. Kemur ikki vend í, fer opiumsbúskapurin at hótta allar royndir at endurreisa landið.

Tá Taliban hevði valdið í Afghanistan frá 1996 til 2001, sluppu bøndurnir ikki at dyrka opium, men síðani NATO-innrásina eru bøndurnir aftur farnir at dyrka opium við tí úrsliti, at Afghanistan nú letur 90 prosent av øllum opium á heimsmarknaðinum.

**STUTT SAGT**

## USA úr Irak

Tað verður ikki friður í Irak, fyrr enn teir amerikonsku hermenninir eru farnir haðani. Tað sigur andaligi leiðarin í Iran, ayatollah Ali Khaminei. Á fundi við irakska forsetan, Jalal al-Talabani, segði Khaminei seg stúra fyri ófriðinum í Irak, sum hann segði vera eina hóttan ímóti grannalondunum. Irakski forsetin vildi hava iranska stýrið at leggja trýst á shiamuslimarnar í Irak fyri at fáa teir at binda frið, og tað lovaði Khaminei at gera. Men hann tók uppaftur, at tað verður eingin friður, fyrr enn USA hevur tikið sínar hermenn heimaftur.

## Avlíva hundar og svín

Myndugleikarnir í Suðurkorea hava gjørt av at avlíva fleiri hundrað hundar og svín í einari roynd at forða fyri, at fuglakrím skal breiða seg. Myndugleikarnir hava funnið fuglakrím í høsnum tætt við býin Iksan, sum er einar 250 kilometrar sunnan fyri Seoul. Í gjár vórðu næstan 700 hundar og 300 svín avlívað. Útlendskir serfrøðingar halda tað ikki vera neyðugt at avlíva súgdjór fyri at forða fuglakrími, men suðurkoreonsku myndugleikarnir siga, at onnur lond hava gjørt tað sama.

## Byggja út

Russar hava ætlanir um stórar útbyggingar á kjarnorkuøkinum tey næstu árini. Stjórin í kjarnorkuráðnum, Sergej Kirjenko, segði í gjár, at ætlanin er at byggja 42 nýggjar reaktorar tey næstu 23 árini. Russland hevur í løtuni 31 reaktorar á 10 kjarnorkuverkum, sum nøkta smá 20 prosent av orkutørvinum. Ætlaða útbyggingin á økinum fer at kosta einar 270 milliardir krónur.